## Smyril í sigling mánakvøldið

SMYRIL

Mánadagin verður nýggi Smyril settur í regluliga sigling millum Havnina og Suðuroynna. Fyrsti túrurin verður av Havnini mánakvøldið kl 19.

Síðsti túrur gamla Smyril – hjá Smyril 1 – verður av Tvøroyri mánadagin kl. 15:30.

Av Strandferðsluni verður sagt, at fyribils eru ongar tillagingar gjørdar í ferðaætlanini fyri Suðuroyarleiðina ella fyri Bygdaleiðir í Suðuroy.

Tá siglingin er roynd í nakrar dagar, verður støða tikin til, um smærri broytingar skulu gerast.

## 432 mál um vegskattaeftirstøður

TÍÐINDASKRIV

Akstovan hevur í dag latið politistøðunum kring landið 432 mál um vegskattaeftirstøður, til at taka nummarspjøldrini av akførum, sum enn ikki hava goldið vegskatt fyri seinna hálvár 2005.

Kann bileigarin ikki vísa fram kvittan fyri goldna vegskattaeftirstøðu, verða nummarspjøldrini tikin av bilinum.

## Heimasandsmaður í Texas

Texas hevur seinastu tíðina bjóðað seg fram sum eitt veruligt spælistað á Sandi. Kendir tónleikarar ymsa staðni úr Føroyum hava spælt í ovara parti av Ungmannafelagshúsinum Virkinum, har Texas húsast. Leygarkvøldið verður tað ein sandingur, Torbjørn Jensen, sum fer at spæla.

Hann byrjar at spæla um kl 21 leygarkvøldið, og tiltakið verður til umleið kl 2 sunnunáttina.

**nud**

## Georg í Glitni




Georg eystan Á er gamal í garði í Glitni – ella í øllum førum í Kvøldloti, har hann spældi heilt nógv tann tíð tað var. Leygarkvøldið fer hann á pallin í nýgjørda spælistaðnum við Skálatrøð, sum hevur avloyst Kvøldlot. Við sær hevur hann frálíku kontriróddina hjá Sølvu Ford.

Hetta er klimaksið í einum longum tónleikavikuskifti í Glitni, har Andreas Arge leggur fyri hóskvøldið, Kolbein og Sámal halda pallin heitan fríggjakvøldið, áðrenn maðurin aftan fyri kanska Føroya størsta popplag »Sa sa sa sa« trýnur á pallin.

Georg var maðurin, sum við Viking Band legði Ísland fyri sínar føtir, langt áðrenn Eivør, Týr og 200 tóku ljóðføri í hond.

## Eyðun, Tróndur og Pætur í Føroyahúsinum

**Fríggjakvøldið 28. oktober verður hugnaligt café-kvøld inni í Føroyahúsinum við Pætur við Keldu, Tróndur Enni og Eyðun Nolsøe.**



*Pætur við Keldu*

TÓNLEIKUR

*dagfinn@sosialurin.fo*

Hendan trio hevur vant saman í Keypmannahavn eina tíð og møguleiki er nú hjá útisetum at hoyra teir á palli. Á skránni er vælvaldur útlenskur og vælkendur føroyskur tónleikur.

Pætur er kendur frá egnum útgávum í Føroyum, danska Grand Prixnum og nøkrum frálíkum framførslum saman við Eivør Pálsdóttir. Eisini hava hann og Eyðun spælt fitt saman síðstu árini.

Tróndur hevur lisið tónleik í Íslandi og er kendur frá Wild Child, Strange Fruit og ymiskum samarbeiði við navnframa bróðurin Brand Enni.

Eyðun kenna vit frá m.a. Frændum, Eyðun Solo, Eyðun og Terja og Føstufressum.

Café-kvøldið byrjar kl. 21 og endar kl. 01.

## KROSSORÐ

| 439 | TJÓVUR | NØS | EINS | SKILA-FÓLKIň | SVAKLIG | KALIUM | KVINNA | ğ | 500 | TVÍLJÓň | SNAKK | LAND | "MÓTI" | FUGLAR | ITALIA | ÓSIňUR |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| LØN | 1 | | | | | | | GENTAN / IKKI HETTA | | | | | | | | |
| INN-TØKUR | | | | | | HJÁLJÓň / HEIMI | | | LÁG-VAKSIN | BAKI-STAňI / TYSUR | | | | | DONAU / SÝSLU-MERKI | |
| LANDS-VERK | | | GRAMM / RUSS. Á | | VIňGERň / KEYPI-STEVNA | | | | | | | | EINS / DRÍVUR | | | |
| GRAMM | | EINA-FERň / BÝUR Í UK | | 2 | | | | | | | IKKI DJÚPT / REX | | | | 3 | |
| BYRňA | | | | | | | | | | | | EXETER / HJÁORň | | MO I …..? (BÝUR) | EINS | |
| MAňUR | | | | | KALIUM / ITALIA | | KENT LAG | 4 | | | ÚTPÍNIR | | | | | |
| ÍFYLLA | | | KVINNU / STEINGJA | | | | KRÚPI | LITUR / EYKA-MANNI | | r | "KÚGV" / KENDUR | | | | LITUR | |
| RØKTA SEYň | | | | | BYGD | | | | Î | NET / SMÁDÝR | | | | 5 | SPANIA / KEMPUR | |
| METUR | | SUM | | | IKKI HEIMA / LØGIN | | | | TROYTT / LIQUID NATURAL GAS | | | | ÆTTAR-BREGňI / REAUMUR | | | |
| ABER-DEEN | | LAPPI | | | | | | | | | 6 | | | "MÓTI" / 365 DAGAR | | |
| EDD | | MELDING / PENINGI | | | | | VARIN / KVINNA | | | | | | KVINNA | | | |
| BRETSKT FLOG-FELAG | | ⇨ | | | | ORKU-EIND / TILFAR | | | | NÆSTVED / STAňA-NAVN | | | REKKJA / FUGL | | | |
| FÍNUR BILUR | | | BALLI / CARBON | | | | | | 500 / SEM, ---? OG JAFET | | LJÓS / TELDU-ORň | | | RUBIDIUM / STULDUR | | |
| b | SKREIň / ES FYRR | 7 | | KVINNA HJÁ BECK / KLOKKAN | | | | LETUR / FIRMA (STYTT.) | | | | | | | ÁSKRIFT / TUPOLEV | |
| JØDI | | | | | ROMAR-TAL / ITALIA | | TOSA | | | | | Á KROPPI / OXYGEN | | | | METUR |
| ÁVIRK-AňIR | | | | | | | FÆ-LOYSING-UM | | | | 8 | | | | | |

**Vinnari:**

*Marianna Gullaksen*
*Bøgøta 17*
*410 Kollafjørður*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: CAROLINA

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| C | A | F | E | I | N | Á | N | O | R | Ō | S | K | Á | L | A |
| A | R | A | L | | I | | Ó | L | I | | T | Ø | K | U | R |
| T | A | | M | J | A | R | R | A | N | | A | L | I | N | |
| A | R | | A | U | L | A | N | | G | I | L | I | | A | H |
| L | A | U | R | A | | N | A | | K | E | L | V | I | | J |
| I | T | T | | N | I | A | G | | Ø | | U | A | | N | A |
| N | | T | E | I | R | | E | G | B | E | R | T | | A | L |
| A | P | A | | T | | | S | T | I | K | | N | U | L | L |
| 438 | | S | A | A | B | | T | | N | K | T | | | V | A |
| | B | T | X | | S | K | U | G | G | I | N | | A | I | R |
| K | A | V | A | R | A | | R | O | | | | E | L | | |
| Í | | I | L | A | | F | | | T | I | L | L | M | I | N |
| N | | Ō | | K | | F | A | R | I | N | | B | A | R | K |
| I | K | | S | A | K | I | N | | R | A | K | A | | | Ä |
| | A | R | K | | I | | | F | O | R | | | M | I | R |
| B | J | Ø | R | N | A | F | Z | E | L | I | U | S | | M | A |

### Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**439**

**Loysunar-orðið:** ……………………………………

Navn: ……………………………………………………

Bústaður: ……………………………………………

Bygd/býur: …………………………………………

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** - *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***